Dagført: 1. juni 2023

# Politikkur fyri áhugamálsósemjum

**Hesin politikkur hevur til endamáls at fyribyrgja, at kundar í Betri Banka hava tap orsakað av áhugamálsósemjum millum kunda og Betri Banka ella starvsfólk hjá Betri Banka.**

Politikkurin lýsir tær áhugamálsósemjur, sum Betri Banki metir kunnu íkoma í sambandi við íløgutænastur, ið Betri Banki veitir sínum kundum. Politikkurin lýsir eisini, hvussu bankin handfer áhugamáls ósemjur við at skipa fyri fyribyrgjandi leiðreglum og virkisgongdum.

Í minsta lagi eina ferð um árið metir Betri Banki, um politikkurin er nøktandi, ella um møguligar nýggjar áhugamálsósemjur skulu leggjast aftur at politikkinum. Betri Banki metir regluliga, um leiðreglur og virkisgongdir, ið eru partur av hesum politikki, eru nøktandi.

## ÁHUGAMÁLSÓSEMJUR

Betri Banki hevur eyðmerkt týðandi viðurskifti, sum eru ella kunnu verða atvold til áhugamálsósemjur, ið kunnu vera til bága fyri eitt ella fleiri áhugamál hjá kundanum:

- um Betri Banki hevur annað áhugamál enn kundin í sambandi við ta tænastu, sum Betri Banki veitir kundanum
- um Betri Banki antin hevur eina fíggjarliga ella aðra orsøk til at velja áhugamál hjá einum ávísum kunda ella kundabólki fram um áhugamálini hjá einum øðrum kunda ella kundabólki
- um Betri Banki ger handlar fyri egna rokning og samstundis hevur upplýsingar um, at ein kundi kann væntast at koma við einum handilsordra í sama virðisbrævi
- um Betri Banki fær gjald frá triðjamanni, sum kann enda við áhugamálsósemju millum Betri Banka og kundar hjá Betri Banka
- um Betri Banki hevur áhuga í íløgugreiningum, sum viðvíkja virðisbrøvum, ið verða bjóðað kundum hjá Betri Banka

## Handfaring av áhugamálsósemjum

Betri Banki hevur gjørt leiðreglur og virkisgongdir fyri, hvussu Betri Banki skal handfara eyðmerktar áhugamálsósemjur. Leiðreglurnar og virkisgongdir skulu tryggja:

- at trúnaðarvitan einans verður atkomulig hjá persónum, ið hava ein lógligan tørv til tess
- at kundaupplýsingar ikki verða spjaddar til onnur øki í bankanum enn tey øki, har upplýsingarnar skulu viðgerast
- reglur fyri, hvussu starvsfólk, sum veita íløgurágeving til kundar hjá Betri Banka, kunnu ogna sær, geva út ella handla fíggjarlig amboð
- at starvsfólk í bankanum, sum beinleiðis røkja áhugamál hjá bankanum og t.d. handla vegna egingoymsluna hjá bankanum, ikki samstundis ráðgeva kundum í bankanum
- reglur fyri starvsfólk, ið hava persónligan áhuga í íløgugreiningum og útinna íløguráðgeving í virðisbrøvum, ið eru umfatað av greiningini
- at regluligt eftirlit verður gjørt fyri at hava eftirlit við, at leiðreglur og virkisgongdir verða hildnar